# Økt avgjald á grønar keks…

**– og plastikkposar, økja ikki um fólkaheilsuna, nei, ein miðvísur heilsupolitikkur skal til, um fólkaheilsan skal varðveitast.**

**Joan Ziskason**
*Valevni hjá Suðurstreymoyar Javnaðafelag*



Tað líkist ongum, at grønnmeti, frukt og mjólk, eru so kostnaðarmikil. Børnini læra í dag frá foreldrum, pedagogum, lærarum, og lesa um, hvussu neyðugt tað er at eta nógv grønnmeti og frukt, og at drekka mjólk. Men tá farið verður til handils at keypa inn, hevur peningapungurin mangan ikki ráð til hesa neyðuga vøru. Kræftens Bekæmpelse gjørdi eitt átak fyri nøkrum árum síðani, um at hvør og ein skuldi eta 600 gramm av grønnmeti og/ella frukt um dagin, um ein vildi verða við til at fyribyrgja krabbamein hjá einum sjálvum. Orsøkin til at vit skulu eta so nógv grønmeti og frukt er sera einføld: Grønnmeti og frukt taka krabbameinskyknir úr kroppinum, tá vit útskilja tey. Tað kann gott vera, at fleiri av teimum eldru lesarnum hugsa og siga, at hatta er nakað møsn, tí einki er betri fyri fólk, enn at eta føroyskan mat. Alt í lagið við tí, tí føroyskur matur smakkar best, men vit eru noydd til at broyta okkara kostvanar, í mun til hvussu nógv vit røra okkum. Støðan er tann í dag, at tey nógvu hava sitandi arbeiðið, tey røra seg ikki so nógv, sum fyrr, og tí skulu matarvanarnir broytast, í mun til tað.

Ein fyribyrgjandi heilsupolitikkur er átroðkandi at fáa settan í verk. Heilsusystrar og onnur gera eitt megnar arbeiði hesum viðvíkjandi, men tey megna ikki alt.

# Kvinnur í Suðuroy og almenn arbeiðspláss

**Finnleif Guttesen**
*Valevni fyri Suðuroy*



Grundgevingin fyri ikki at flyta arbeiðspláss er, at embætisfólk í miðstaðarøkinum mæla frá hesum, tí eingin er til at manna hesi størv og er hetta sjálvsagt nakað tvætl.

Tað er eingin ivi í mínari sál um, at kvinnur í Suðuroy kunnu manna øll almenn arbeiðspláss, sum blíva flutt suður.

Um tit vilja hava arbeiðspláss suður, skulu tit velja fólk á ting, sum alment fara at krevja, at almennir stovnar í Tórshavn blíva fluttir til Suðuroy og tað skal ikki bert verða fimm ella tíggju arbeiðspláss.

Nú flokkar siga, at tey almennu arbeiðsplássini skulu skerjast, kemur ikki eitt arbeiðspláss til Suðuroy við politikarum úr fráfarandi samgongu, tí teir vóru stýrdir í høvd og reyv, av embætisveldinum.

# Ein nýggj byrjan er neyðug – aftan á fullveldisrúsin

**Johan Dahl**
*valevni Sambandsfloksins í Suðuroy*



Fullveldistimburmennirnir eru nú av álvara byrjaðir .

Fíggjarlógaruppskotið sum bleiv lagt fram boðaði frá einari samgongu ,sum hevði vassað nógv longur út í fíggjarligt óskil enn hon grynti og sum nú ,uppá ein máttleysan ,ússaligan máta royndi at vinda eitt sindur meir burtur tí longu sperda føroyska skattgjaldaranum

At fara so langt út, sum at tosað um, at hetta var í fólkaheilsunnar navnið tað sigur ikki so lítið um markleysa frekleika teirra.

Teir tordu ikki at kalla ein spaka fyri ein spaka, líka lítið sum teir tordu at geva Føroya fólkið lovaðu fólkaatkvøðuna.

Nù er stundin komin at fáa kollsigldu skútna aftur á rættkjøl

Tað er uppá hægstu tíð at Føroya fólk aftur fær flokkar í landsins leiðslu sum fyrst og fremst hugsa um føringin og dagligdagin hjá okkum øllum ,- at tryggja, at hesin verður so góður og tryggur sum gjørligt.

Ein nýggj byrjan er neyðug og hana vil Sambandsflokkurin bjóða føringum at standa á odda fyri.

Sambandsflokkurin ynskir at Føroyar eisini komandi árini aftur kann roknast fyri at vera eitt vælferðarsamfelag sum gevur vælferð og møguleikar til tann einstaka.

Hetta kunnu vit einans gera um vit eru før fyri at skapa vøkstur.

Búskaparvøkstur er treytin fyri at vit kunnu fáa m.a. betri sjúkrahús, skúlar og eldraforsorg.

Sambandsflokkurin kemur at fremja eina langsiktaða ætlan, ein reform av teimum viðurskiftunum sum eru avgerandi fyri okkara framtíðar vælferð.

Mál Sambandsfloksins er nevniliga at Føroyar framhaldandi skal vera millum bestu londini í verðini at arbeiða, búgva og liva.

Føroyingurin skal hava ein góðan og tryggan gerandisdag.

Føroyar er komið á eitt vegamóti har neyðugt er at leggja ein miðvísan politikk fyri komandi árini.

Við niðurskurðinum í blokkstuðulinum, við ótálmaða vøkstrinum í útreiðslum landskassans seinastu 7 árini og við nú minkandi inntøkum landskassans, er neyðugt at reka ein miðvísan politikk, sum leggur seg eftir at skapa inntøkur til Føroyska samfelagið.

Sambandsflokkurin er trygdin fyri einum vælvirkandi framtíðar Føroyum fyri øll.

Við at velja Sambandsflokkin tann 20 Januar 2004 er TÙ við til at tryggja vælferðarsamfelagið Føroyar í komandi tíðum.

# Sjálvstýrið sjálvandi ! Set kross við lista D

**Malan Johansen**
*valevni hjá Sjálvstýrisflokkinum í Suðurstreymi*



At verða ein sjálvstøðug tjóð er sjálvandi málið. At klára seg sjálvan gevur eina góða kenslu og ein stoltleika.

Sjálvstýrisflokkurin fer tí framhaldandi at arbeiða fyri, at Føroyar verða ein sjálvstøðug tjóð. Men vit skulu hava fólkið við okkum. Tí skulu vit arbeiða málrættað móti, at føroyski búskapurin verður sjálvberandi. Hetta merkir eisini, at føroyingar stigvíst skulu yvirtaka øll málsøkini frá Danmark. Tá vit eru komin so langt, skal endaliga avgerðin, um Føroyar skulu loysa frá samveldinum, avgerast á eini fólkaatkvøðu. Avgerðin hjá hvøjrum einstøkum føroyingi, verður tá ikki tengd at teimum búskaparligu viðurskiftunum.

Útlitini at røkka málunum eru góð. Búskapurin er væl fyri. Tekin eru um niðurgongd í búskapinum, men vit koma ikki út í nakra álvarsama kreppu, sum í 90'unum. Búskapurin er munandi sterkari. Netto uttanlandsskuldin er minkað frá 7 mia. í 1990 til eina ogn í útlandinum uppá 4 mia. Eingi veðhald hanga yvir landskassanum, stórir partar av vinnulívinum hava lítla ella onga skuld, peningastovnarnir eru væl fyri og gjaldførið bæði hjá landskassanum og peningastovnunum er gott. Hetta gevur okkum munandi betur fíggjarligt rásarúm at arbeiða okkum fram til ein sjálvberandi búskap.

# Barnapsykiatriska deild beinanvegin

**Finnur Helmsdal**
*tjóðveldisflokkurin*



Tørvurin á einari væl mannaðari barnapsykiatriskar deild í Føroyum veksur dag frá degi. Hetta tí ein alsamt vaksandi bólkur av føroyskum børnum og ungum hava tørv á psykiatriskari viðgerð. Hetta tí ein alsamt vaksandi bólkur av føroyskum børnum og ungum hava tørv á at fáa staðfest orsøkina til trupulleikar sínar og síðan hvussu hesir skulu viðgerast.

Tað kann einfalt ikki góðtakast longur, at børn og familjur teirra skulu ganga í áravís og bíða eftir einari staðfestin, sum skuldi verið ásett mest sum beinanvegin, trupulleikin bleiv sjónligur. Nøkur fáa enntá ongan tíð staðfestingina. Bíðitíðin er ræðulig og niðurbrótandi fyri allar partar. Ikki minst tí tað mangan verður gitt um orsøkir og diagnosir og arbeitt út frá tí. Úrslitið er tí mangan, at børnini og tey ugu antin onga viðgerð fáa ella ta skeivu. Lívsleiðin hjá barninum er hótt og ringasta føri oyðiløgd, og bæði barn og familjan sum heild fáa eina lítið tespiliga tilveru.

Hetta ljóðar kanska sum tann reini heilaspuni, men tað er tíverri satt. Ein barnapsykiatrisk deild hevði sjálvsagt ikki loyst allar slíka trupulleikar, men hon hevði tikið broddin av trupulleikanum og væl tað. Eisini tí hon kundi ráðgivið og vegleitt tey, sum dagliga eru um hesi børn og ung.





# Kom og bygg land

**Kristian Magnussen**
*løgtingsmaður og valevni Javnaðarfloksins í Suðurstreymi*



Eitt av aðalmálunum hjá Javnaðarflokkinum er at hjúkla um tað einstaka menniskjað og at varðveita og bøta um menniskjans tørv, trivnað og vælferð. Samgonguflokkarnir síðan 98 hava bert havt eina óreaIistiska loysingarætlan sum mál. Hóast lítið annað er komið burturúr, so hava teir víst í verki, at teir eru til reiðar at offra fólksins vælferð fyri at náa málinum.

Ikki bert gerandisdagurin hjá tí einstaka er vorðin ótryggari, men so sanniliga eisini umstøðurnar hjá vinnuni. Teir halda hánt um, at fólksins vælferð og umstøðurnar hjá vinnuni eru avgerandi fyritreytir fyri samfelagsligari menning.

Skulu vit hava nakað at deila, so er neyðugt at virðir verða skapt. Skulu virðir skapast, so er neyðugt at fólkið trívist og at familjan og einstaklingurin hava tað gott.

Javnaðarflokkurin vil menna fólkaræðið, sosialu ábyrgdina og møguleikarnar fyri privatum fyritakssemi. Tey ágrýtnu og virkisfúsu skulu sleppa at royna seg, tó uttan at hin veiki, fátæki ella illa menti verður við skerdan lut.

Latið okkum á valinum 20. januar standa saman um norðurlendsku javnaðarhugsjónina, ið hevur prógvað sítt virði, sum besta samfelagsskipanin í heiminum. Latið okkum standa saman um at røkja hana og útbyggja hana.

# Útjaðarin skal mennast fyri at gera Føroyar ríkari

**Bjørn Kalsø**
*valevni Sambandsfloksins í Norðoyggjum*



Tað loysir seg at flyta almennar stovnar úr høvuðsstaðarøkinum, og íløgur í útjaðarin løna seg eisini.

Stendur útjaðarin sterkur, fer tað við tíðini at spara landinum útreiðslur, umframt at hetta vil ríka samfelagið á annan hátt.

Gongdin seinastu árini sigur okkum, at miðstaðarøkið av sær sjálvum dregur fólk og virksemi at sær. Hetta ger, at størsti parturin av peningarenslinum endar í høvuðsstaðarøkinum. Kappingin við miðstaðarøkið gerst ov hørð, og fyritaksemi, so sum handlar og smáídnaður úti um landið heldur uppat.

Vit føroyingar hava stórt sæð bara ali- og fiskivinnina at líta á umframt ríkisveitingina. Og tað er serliga fólkið í útjaðaranum, sum beinleiðis livir av hesum vinnum. Ein møgulig kreppa merkist tí altíð fyrst í útjaðaranum. Tí kann eitt ávíst alment virksemi og skilagóðar almennar íløgur í útjaðarinum virka stabiliserandi í búskaparligum niðurgangstíðum

Velja norðoyingar eitt umboð á sambandslistanum á ting, fer viðkomandi, umframt at føra ein skilagóðan fíggjar- vinnu- og familjupolitik fyri alt landið, eisini at gera alt fyri at skapa karmar, soleiðis, at Norðoyggjar framhaldandi koma at mennast á sama hátt, sum restin av landinum.

Á tingi fara vit m.a. at arbeiða fyri:

- At anlegg innan landsvegakervið í Norðoyggjum, sum annahvørt standa í hálvum gekki, ella ikki eru tíðarhóskandi, verða gjørd. Soleiðis at vegakervið í Norðoyggjum líkur somu trygdarkrøv, sum í miðstaðarøkinum.
- At ferðasambandið millum oyggjarnar verður betra.
- At fiski- og útróðrarmenn fáa tryggar karmar at virka undir, bæði tá talan er um arbeiðsumstøður, veiðumøguleikar og inntøkutrygd.
- At Klaksvíkar Sjúkrahús og heilsuverkið í Norðoyggjum, fær rúmari karmar.
- At barnaansingar- og eldraøkið verður prioriterað og betrað.
- At ungdómurin framhaldandi fær betri og mennandi lestrarmøguleikar í góðum lestrarumhvørvi.
- At ítróttur og mentan annars fáa gróðrarlíkindi.

Stutt sagt, Klaksvíkin skal mennast til sannan miðdepil í norðasta parti av landinum nú fasta sambandið við meginøkið um stutta tíð gerst veruleiki. Tað loysur seg fyri eitt land at hava sterkar eindir í útjaðarinum. Veljið tí sambandsflokkin á valinum 20. januar.

# Segði nakar rukkulív…

**Heðin Mortensen**



Ikki hissini gleps, Páll á Reynatúgvu gevur frá sær, nú hann eftir øllum at døma roynir at endurskapa øsingarherferðina hjá tjóðveldisharkaliðnum frá undanfarna løgtingsvali.

Fyrrverandi landsstýrismaðurin hjá tjóðveldinum skjýtur mær í skógvarnar, at eg upp undir valið í 2002 brúkti mín sess sum ÍSF-forseti til »at reka persónligt og partapolitiskt valstríð við«. Enn eina ferð eru hetta ósannindi úr enda í annan!

Eg ætli mær als ikki at viðgera IOC-spurningin ella nakað annað ávíst ítróttarmál í valstríðnum, og tað havi eg heldur ikki gjørt.

At so tjóðveldismenn royna at gera tað, bæði við og uttan høvi, er nakað heilt annað. Teir máttu havt lært, at leitar tú eftir lægsta felagsnevnara, finnur tú hann oftast hjá tær sjálvum!

Undan síðsta vali vóru tað júst tjóðveldismenninir, sum ein fyri og annar eftir royndu at spinna sær politiskt gull burtur úr føroysku royndunum at vinna sær olympiska viðurkenning, og teir um tað!

Eg má bara staðfesta, at Páll á Reynatúgvu óivað hevur roynst munandi betri sum ítróttarmaður, enn hann hevur sum politikari. Tó undrar tað meg, at hann eftir øllum at døma ikki hevur lært, at farast skal eftir bóltinum og ikki manninum…

Tann øsingarherferðin, tjóðveldismenninir løgdu so stóra orku í undan síðsta løgtingsvali, staðfesti so dyggiliga, at júst í greinini rukkulív verða teir ikki tiknir! Meira kemur ikki frá mær um hetta á hesum sinni, annað enn ein áheitan á Páll á Reynatúgvu um at vera sakligur, hóast tað helst er í seinna lagi at biðja um tað nú.

# Javnaðarflokkurin torir

**Edvard í Skorðini Joensen**
*valevni Javnaðarfloksins i Vágum*



Javnaðarflokkurin er einasti flokkur sum alla tíðina hevur meldað greitt út, at rækjuflotin skal hjálpast úr kreppuni

Kreppurakti rækjuflotin skal hjálpast undan hóttafallinum, sum í løtuni er.

Hetta eigur at gerast í samstarvi millum vinnuna sjálva, fíggingarstovnar og politisku leiðslu landsins.

Javnaðarflokkurin hevur alla tíðina, síðan vinnan fór at tosa um trupulleikarnar, boðað greitt frá, at hann er fyri at hjálpa vinnuni.

Aðrir flokkar hava roynt at gjørt hesa hjálp til banniorð, men eru nú komnir á aðrar tankar og hava sannað, at leiðin hjá Javnaðarflokkinum er tann rætta.

Tað er Guðs barn, ið batnar, og saman kunnu vit hjálpa vinnuni aftur á føtur.

Latið Javnaðarflokkin standa á odda fyri landsins leiðslu. Tað hava hinir flokkarnir sannað at vera tað besta.

Tað gera vágafólk eisini tann 20 januar.

Gott javnaðarval

# Framtíðar ferðasamband til Suðuroynna

**Jacob Vestergaard**
*valevni Fólkafloksins í Suðuroy*



Tá nýggi vegurin millum Havnina og Gomlurætt alment var tikin í nýtslu áðrenn jól, segði formaðurin í Vinnunevndini, sum eisini er tingmaður fyri Suðuroynna, at nú var næsta stigið at hugsa um eystanbygdirnar á Sandoynni.

Sjálvtsagt skulu eystanbygdirnar á Sandoynni hava gott vegasamband, men suðuroyartingmaðurin átti at havt hugflog til at hugsað longur fram.

Fyri undirritaða og mong onnur, er vegastrekkið millum Havnina og Gomlurætt byrjanin til fast samband suðureftir, fyrst til Sandoynna og upp á longuri sikt til Suðuroynna.

Hetta liggur sjálvtsagt nakað frammið í tíðini, og er tengt at fíggjarviðurskiftunum í landinum, men arbeitt eigur at verða miðvíst við hesi ætlan.

Aftan á Norðoyatunnilin, sum vantandi verður liðugur í 2006, eigur næsta stóra verkætlanin at verða ein Sandoyartunnil.

Hóast stórur avstandurin er millum Sandoynna og Suðuroynna, ber tað til í dag at gera slíkar tunnlar, í hvussu so er uppi á landi, og við tí tøknuligu framgongd, sum er í dag, verður hetta ikki nakar trupuleiki um nøkur ár.

Framtíðar vega- og tunnilsarbeiði á Sandoynni og í Suðuroynni má leggjast soleiðis til rættis, at tað passar til ætlanina um fast samband frá Streymoynni, um Sandoynna, til Suðuroynna.

Hendan ætlan má gerast skjótast, so komandi Løgting miðvíst kann arbeiða eftir henni.

Suðringar eiga samstundis at velja umboð á Løgting, sum hugsa um Suðuroynna fyrst og fremst.

Veljið Fólkaflokkin.